SOSIALURIN

Nr. 61 — 26. AUGUST 1964 — 37. ÁRG.

Í DAG

Aftur til valborðið

Val — og valfusk

Í sambandi við seinasta løgtingsval visti »Dagblaðið« at greiða frá, at í Norðoyum høvdu Einar Waag og Villi Sørensen ferðast bygd av bygd og framt valfusk. Hetta vóru sjálvandi grovar skuldsetingar, sum tó vóru afturvístar. »Dagblaðið« ella fólkaflokksmenn gjørdu einki meira burtur úr hesum máli, hóast tað er illa hugsandi, at teir vildu eirt javnaðarmenn, um teir høvdu nøkur sannfør prógv fyri sínum skuldsetingum.

ELLA — var samvitskan ikki nóg góð? ? ?

Aftur nú dregur »Dagblaðið« hesar skuldsetingar fram aftur í ljósið; men neyðarsligt mátti tað verið ikki at átt frægari vápn móti sínum mótstøðumonnum, serstakliga tá flokkur tess er so væl fyri at eiga leiðsluna í landsins stýri og sostatt kann fremja tann politikk, ið flokkurin hevur barst fyri.

TAÐ mátti verið hábærsligari av blaðnum at sagt veljarafjøldini frá teimum avreksverkum, ið framd eru undir teirra leiðslu, heldur enn at ofra teigar fyri at endurtaka avgamlar skuldsetingar, ið einki hava við veruleikan at gera.

MEN hetta er kanska góður »Dagblaðs«-sigur fyri at fjala avreksleysan fólkaflokkspolitikk!

SOSIALURIN Viðmerkingar

SLAKAR 600 ATKVØÐUR VUNNAR, MEN SKÚGVAÐIR TIL VIKS

Aftaná seinasta løgtingsval segði ein av ovastunum í sjálvstýrisflokkinum, at hann ikki visti, hvør ið kom at gera landsstýri; men hann dugdi ikki at siggja, at tað undir nøkrum umstøðum bar til at halda javnaðarflokkin uttanfyri eitt nýtt landsstýri.

Ein framgongd uppá 600 atkvøður er eftir føroyskum viðurskiftum einki minni enn ein stórsigur fyri ein flokk; men hóast henda stórsigur varð javnaðarflokkurin skúgvaður burtur úr landsins stýri av teimum sokallaðu »sjálvstýrisflokkunum«, ið vanliga kappast um at tala um fólkaræði og demokrati.

Ein flokkur, ið hevði vunnið 28 pst. av øllum atkvøðum varð náðileyst skúgvaður til viks, fyri at ein pinkulingaflokkur, ið einans hevði fingið umleið 4 pst. av atkvøðunum, kundi koma uppí landsstýrissamgonguna — ikki eingongd uppí landsstýrið, tað var hann ov lítil til.

Hetta rópa teir sokallaðu »sjálvstýrisflokkarnir« fyri demokrati — fólkaræði.

Eingin demokratur vil nakrantíð ásanna, at hetta hevur nakað við veruligt demokrati at gera. Tað, at einsamallur maður fær landsins lagnu í sína »hulu hond«, er knýttur nevi móti fólkaræðinum.

Brøv til Sosialin

VEGAGERÐIN

Tað nýtist ikki at draga fram eina einstaka bygd, tá tað eru so nógvar, sum eru fyri sama býti sum min heimbygd, hvat vegagerð viðvíkir.

Hin forkastiligi mátin at játta ofta ov lítlan pening til einar 100-200 metrar um árið at gera, verður tíverri nýttur við sama lag nógvastaðni, har tað ikki er talan um størri vegastrekkir — ella lat okkum siga høvuðsvegir.

Í smærri bygdum kann ein valla tala um høvuðsvegir; men hesir smávegir eru ofta líka týdningarmiklir fyri hitt einstaka smáplássið og høvuðsvegir eru fyri tær nógvu bygdirnar.

Slíkir vegir kundu ofta verið gjørdir eftir einum ári ella íð hvussu er rættiliga fáum árum og vildu ikki kosta stórvegis pening; men har liggja vegstrekkir illa farin av elli, men framvegis líður einki fyri, at hesin »nýggi« bygdavegur verður líðugt gjørdur.

Nú talan er um so miklan pening, fari eg og mangir við mær, at heita á teir ráðandi um at fáa gjørt enda á hesari smávegagerð beinanvegin.

Bygdarmaður.

Veitst tú

AT »Dagblaðið« — nú teir skuldu avseta pening til yvirtøku av skúlanum, men fólka flokkurin var ímóti — verjir seg við, at teir als ongatíð hava meint at yvirtikið ein danskan skúla — men ein FØROYSKAN skúla. Tað verður so t. d. studentaskúlin, kanska??

AT tað búplass í heiminum, sum liggur hægst uppi, er ein lítil indianarabygd á markinum mill um Chile og Argentina — hon liggur í 7000 metra hædd.

AT amerikanskur kavasvalir, sum um summarið halda til í Grønlandi, eru í Antarktis um vetrarin, haðani flogleiðin er 17.000 km.

AT heimsins fremsti »ferðamaður« er Oscar Jones, flogskipari hjá BOAC. Tá hann 56 ára gamal legði frá sær, hevði hann flogið í 21.600 tímar, og flogleiðin var 4.200.000 enskar mil.

AT flestu hvalasløg ikki hava tenn, men at tey fáu, sum hava tenn, ikki missa tær eins og onnur djór.

Eg veit tað

YVIRTØKAN AV SKÚLANUM

Í figgjarlógaruppskoti sínum sigum sigur Erlendur Patursson, at eingin meiraluti fekst til at avseta pening til yvirtøku av fólkaskúlanum, kennaraskúlanum og postverkinum, t. v. s., at fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin hava verið ímóti. 25. august 1961 skrivar »14. sept.« um hetta sama mál:

»Í 1957, tá fólkaflokkurin saman við tjóðveldisflokkinum átti meiri luta á tingi, vildi fólkaflokkurin ikki greiða atkvøðu við uppskoti tjóðveldisflokksins um at lata øll skúlamál landsins koma á føroyskar hendur. Men seinri aftaná valið í 1958, tá fólkaflokkurin var minkaður so nógv, at hann saman við tjóðveldisflokkinum ikki longur var í meiraluta, hevði hann greitt atkvøðu við uppskoti tjóðveldisflokksins um yvirtøku. Tað kundi hann ekkaleysur gera! Tá hetta var lisið upp á tingfundinum hósmorgunin, kom illsinni í Hákun — og fingu tingmenn og áhoyrarar ein góðan látur upp undir døgurðan.«

Skipafelagið Føroyar

greiðir allan fluttning

á sjógvi

á landi

í luftini

Bíleggið ferðaseðlar

Pf. Skipafelagið Føroyar

Tlf. 1225

AGN

Nýfryst HAVSILD á goymslu.

P-F BACALAO

tlf. 1360.

FÆRØSK MARGARINE

Vita No 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT — FINT PRODUKT

Spik

Vit keypa gott turrsaltað spik.

Kjøtbúðin

Otto Reinert, tlf. 1828.

IRIS

Heitur matur — Smurt breyð

Landbúnaðurin

Nútímans búnaðarskipan er málið

Hjá javnaðarflokkinum er eingin ivi um, hvør kós skal vera hildin, um vit av sonnum kunnu fáa fulla nýttu burtur úr jørðini og rikidømi hennara.

Jørðin er landsins og fólksins, og tað er fólksins náttúrliga krav, at hon verður løgskipað og haggreidd við slíkum skili, at úrtøkan verður samsvarandi jarðarvirðið og tær peningailogur, ið samfelagið leggur í jarðarbrúkið sum heild.

Allir vita í dag, at jørðin bert gevur ein brotspart av tí, ið hon veruliga eigur og um rætt verður framfarið. Tí er at fara til verka og skapa ta løggávu, ið er fyrsta treytin fyri skilagóðari nýtslu av jørðini og síðan gera tær peningaileggingar, ið avgjørt eru neyðugar eisini á hesum øki, og soleiðis at so mong, sum gjørligt sleppa í upp part at røkja og útnytta teir møguleikar, ið jørðin altíð goymir.

Størri ilogur, fleiri hendur í arbeiði, betri røkiskapur og størri úrtøka fyri allar partar, eru ikki bert leysar hugsjónir, men dagsins óreingiligu krøv. Vit tveita allar gamlar fordómar burtur, lata teiga- og ognar- ella arvaklandur falla.

Tað er lætt gjørt: hitt almenna smíðar lógir — ikki bara at beina misjavnar og tápuligar fordómar av vegnum, men við ti endamáli at tryggja samfelagnum hina størstu úrtøku av jørðini.

Javnaðarflokkurin hevur vist á leiðirnar, og flokkurin vil ikki helma í, fyrr enn hvør einasta av endamálsgreinunum er framd út í æsir. Vit kunnu gera stórverk á hesum øki — og hetta kann gerast — og einans — við fylking um javnaðarflokkin.

Kvinnan

86 KVINNUR UPPSTILLAÐAR TIL FØLKATINGSVALIÐ

Í Føroyum hevur tað gingið ógvuliga striltið at fingið kvinnuna fram í politikki eins og í øðrum almennum umboðsstørvum.

Í næstseinastu tingsetu hendi tó tað gleðiliga, at ein kvinna á fyrsta sinni sessaði seg við tingborðið; men tó er tað keðiliga at viðmerkja til hesa hending, at hon ikki beinleiðis var løgtingskvinna, men bara kom at sita har sum tiltakskvinna.

Sambært seinastu tíðindi úr Danmark eru 86 kvinnur stillaðar upp til komandi fólkatingsval.

Av hesum eru 8 úr javnaðarflokkinum, 18 úr radikala flokkinum, 15 úr konservativa flokkinum 11 úr vinstraflokkinum, 14 úr rættstatsflokkinum, 7 fólkasosialistar, 10 úr uttanveltaða flokkinum og 3 úr friðarflokkinum.

BARNAMATUR

DULD NØVN. Í hesum lítla pettinum, vit prenta niðanfyri, eru fjald seks gentunøvn. Lesur tú varliga, er ikki so ringt at raka við tey.

— Við ringum toli sat hon. »Tel samans«, segði hann aðru ferð; men hon hugsaði meira um djóra ungar, kettlingar sínar, sum hon sá raskar renna umkring.

VERULEIKI

TAÐ ER VERULEIKI

AT undir tí sokallaða sjálvstýrislandsstýrinum er bensingjaldið hjá útróðrarmonnum hækkað frá 20 upp í 40 oyru liturin, samstundis sum tollurin á pelsunum hjá teimum ríku frúunum er lækkaður frá 60 niður í 40 pst.

— Tíðin er ofta hin besti læknir; men nakar vakurleikaserfrøðingur er hon ikki!

—o—

SØGA. Ein bispur ráddi einum politikkara til at fara út í regnið og venda andlitið beint uppeftir — so vildi hann fáa eina opinbering.

— Eg fekk onga opinbering, segði politikkarin dagin eftir, tá hann aftur tosaði við bispin. Alt, eg upplivdi, var at regni rann niður innanfyri flippuna, og har stóð eg og kendi meg sum ein býttling.

Ja, men var tað kanska ikki ein opinbering, svaraði bispurin.

—o—

— Tað einasta eg vil hava er hvíld og friður, og tað skal eg hava, sjálvt um eg noyðist at berjast fyri tí alt mítt lív!